# Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag, hósdagin og fríggjadagin:** Strúkur í vindi ella hvassur vindur av norði og landnyrðingi og kava- ella heglingsælingur. Hitalagið um frostmarkið.




**Veðrið leygardagin og sunnudagin:** Fyrst gul til stívt andøvsgul av norði, men seinni veksur hann vindin upp í hvassan vind av landnyrðingi. Kava- og heglingsælingur og hitalagið um frostmarkið.

# Markus Evangeliið í Kunoy, Húsavík og Norðurlandahúsinum

*Niels Vigild sigur frá um Jesus — sera livandi og hevur hann fingið sera góð ummæli. Hetta er einmansleikur*

Hesa vikuna kemur danski sjónleikarin Niels Vigild á Føroyaferð og fer hann at framføra Markus Evangeliið sum ein einmansleik. Niels Vigild sigur frá um Jesus — sera livandi og hevur hann fingið sera góð ummæli, har hann hevur verið og spælt. Ein danskur ummælari, Jonna Gade, hevur skrivað soleiðis um leikin:

»Í 1. parti av einmansleikinum, er tað ikki so nógv Jesus, men serliga Markus, sum talar. Markus trýr upp á Jesus – upp á ein kanska eitt sindur barnsligan hátt, og sær upp til hann og hansara undirverk. Í 2. parti kemur Jesus meiri inn í myndina«.

Niels Vigild hevur spælt Markusevangliið bæði á sjónleikarahúsinum og í kirkjum í Danmark.

Leikurin verður framførdur á hesum støðum og hesar tíðir:

Leygardagin 15. apríl kl. 15.00 í Kunoyar kirkju

Sunnudagin 16. apríl kl. 16.00 í Norðurlandahúsinum

Mánadagin 17. apríl kl. 20,00 í Húsavíkar kirkju

Í leikinum Markusevangeliið er Niels Vigild á palli í góðar 2 tímar, og hevur tað vakt undur ymstaðni, hvussu hann kann hava lært seg evangeliið uttanat, og hvussu hann hevur tulkað hetta.

Ulla Gottlieb hevur instruerað leikin »Markusevangeliið«, og tónleikin hevur Jesper Lutzhøft gjørt. Niels Vigild kemur til Føroya mikudagin, og eru tit vælkomin at tosa við hann, og fer hann at búgva í Norðurlandahúsinum.



*Hesa vikuna kemur danski sjónleikarin Niels Vigild á Føroyaferð og fer hann at framføra Markus Evangeliið sum ein einmansleik*




Eitt hátrýst í landsynning sunnan úr Hvarvinum fer í landnyrðing. Eitt lágtrýst yvir Onglandi fer suðureftir og dýpist.




Køld luft við kavaælingi kemur móti Føroyum av norði. Leygarnáttina kemur eitt lágtrýst frá Grønlandshavinum móti Føroyum.




**Hitalagið mált frá 10./04. kl 06⁰⁰–11./04. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 3,2°C**
Minsti hiti máldur í apríl: **÷9,9°** Mesti hiti máldur í apríl: **15,0°**




Avfallið: 3,0 mm – **mált frá 10./04. kl 6⁰⁰–11./04. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í apríl: 31,1 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷8 |
| Nuuk | ÷2 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | ÷3 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 8 |
| London | 11 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 6 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannahavn | 8 |
| Helsinki | 3 |
| Moskva | 14 |
| Berlin | 8 |
| Warzawa | 10 |
| Kiev | 11 |
| Bukarest | 11 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 18 |
| Athen | 18 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 23 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 22 |
| New York | 10 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 22 |

## Vestfalskyrrindi

8. apríl: Mánin næstur jørðini
11. apríl: Fyrra kvarter
18. apríl: Fullmáni

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/ Sundalagnum fp | sp | Vestmanna-sundi fp | sp | Mykines-firði fp | sp | Nólsoyar-firði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/ Svínoyarfirði fp | sp | Hvanna-sundi fp | sp | Fugloyar-firði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. apr. | 0:58 | 13:45 | — | 12:45 | 0:13 | 13:00 | 2:58 | 15:45 | 3:58 | 16:45 | — | 12:00 | 11:00 | 23:48 | 1:13 | 14:00 | 2:13 | 15:00 | 0:43 | 13:30 | 1:58 | 14:45 |
| 13. apr. | 2:33 | 15:21 | 1:33 | 14:21 | 1:48 | 14:36 | 4:33 | 17:21 | 5:33 | 18:21 | 0:48 | 13:36 | — | 12:36 | 2:48 | 15:36 | 3:48 | 16:36 | 2:18 | 15:06 | 3:33 | 16:21 |
| 14. apr. | 4:02 | 16:34 | 3:02 | 15:34 | 3:17 | 15:49 | 6:02 | 18:34 | 7:02 | 19:34 | 2:17 | 14:49 | 1:17 | 13:49 | 4:17 | 16:49 | 5:17 | 17:49 | 3:47 | 16:19 | 5:02 | 17:34 |
| 15. apr. | 5:04 | 17:29 | 4:04 | 16:29 | 4:19 | 16:44 | 7:04 | 19:29 | 8:04 | 20:29 | 3:19 | 15:44 | 2:19 | 14:44 | 5:19 | 17:44 | 6:19 | 18:44 | 4:49 | 17:14 | 6:04 | 18:29 |

Kelda: Skipalistin 2000

sosialurin Altið fyrst við
www.sosialurin.fo

TURRIKLÆÐI, HÚGVUR, T-SHIRT, KEPPAR og FLØGG




12. MAÐUR
http://soccer.at/faroes